## VIÐMERKINGAR

# Hvar er trupuleikin og hvat er veruleikin? Hví hava tit hesar undirlutakenslurnar?

**Finnleif Guttesen**
*Sambandsveljari*

Av loysingarflokkunum hevur heimastýrislógin og ískoyti úr Danmark fingið mangt toyggið, hesi seinastu 3 1/2 árini teir hava haft valdi í Føroyum.

**Havt verður sagt**
Undir viðgerðini av fíggjarætlanini fyri 2002 sigur ein tinglimur hjá loysingarflokkunum, at heimastýrislógin og ískoyti úr Danmark hevði alla



ábyrgduna av kreppuni fyrst í níti árinum. Sama umboð sigur so, hygg hvussu gott tað gongur ídag, nú vit hava stýrt síðani 1998.

**Sannleikin**
Hvat er so verðuleikin, jú, samgonguflokkarnir hava stýrt síðani 1998 undir heimastýrislógini uttan broytingar og við vaksandi ískoyti frá Danmark. Vælsignaðir loysingarflokkar, hvar er trupuleikin?

**Ábyrgd**
At politikarar í loysingarflokkunum liva í einum so fjarum verðuleika, at tey koma sær at siga við palliba, at vi minni fíggjarorku fáa vit meira vælferð, tá má alt sum eitur ábyrgd vera fána burtur úr teirra hugaheimi.

# Viðmerkingar til grein frá Føroya Pedagogfelag um Dagstovnaøkið

**Jacob Vestergaard,**
*formaður*

Føroya Kommunufelag (FKF) hevur í nógv ár talað fyri, at greiða verður fingin á, hvørji málsøkir kommunurnar skulu umsita og hvørji landið skal umsita. FKF heuvr tí tikið undir við teimum ætlanum sum landstýrið hevur hesum viðvíkjandi, har roynt hevur verið at fingið greiðu á hesum, m.a. við álitinum um uppgávu og ábyrgdarbýti millum land og kommunur, sum er um at verða liðugt.

Land og kommunur mugu taka støðu til, hvørji málsøkir kommunurnar skulu umsita, og raðfesta hvussu økini verða flutt út til kommunurnar. Neyðugu pengarnir mugu fylgja við, og kommunurnar eiga í mest møguligan mun sjálvar at avgera, hvussu málsøkini verða umsitin.

Nøkur málsøkir eru, har land og kommunur í felag hava umsitið økið, og eru hesi økir lættari at leggja út til kommunurnar, tí kommunurnar her hava neyðuga umsitingarliga førleikan.

Dagstovnaøkið var eitt av teimum málsøkjunum, har kommunurnar høvdu drúgvar umsitingarligar royndir, og var tað tí upplagt, at hetta økið, sum tað fyrsta, bleiv lagt til kommunurnar.

Flest allar kommunurnar tóku undir við at dagstovnaøkið bleiv kommunalt burturav, og er hetta økið minst líka væl skipað í dag, sum tá land og kommunur umsótu tað í felag.

Fyri FKF var tað ein sjálvfylgja, at tað nú vóru kommunurnar sum skuldu samráðast um lønir við avvarandi felag, men hetta hevði Føroya Pedagogfelag longi um at finna útav ella góðtaka.

Tað átti at sagt seg sjálvt, at felagið skuldi samráðast við tann sum er arbeiðsgevari og rindar lønina, alt annað hevði verið heit burturvið.

Á vári 2000 fór FKF undir at fyrireika stovnanina av Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag (FKA), og í oktober mánað sama ár, bleiv felagið stovnað. Hetta málið hevði verið umrøtt í FKF longi, men avgerðin um at flyta dagstovnaøkið út til kommunurnar, fekk gongd aftur á málið.

FKA fór til verka beinan vegin, og gjørdi m.a. sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag um lønirnar v.m. hjá dagrøktarunum.

Onki hoyrdist frá Føroya Pedagogfelag fyrrenn felagið vendi sær til Fíggjarmálastýrið í februar 2001, t.v.s. 8 mánaðir eftir, at dagstovnaøkið var lagt út til kommunurnar.

Í staðin fyri at koma við ábreiðslum móti landstýrinum og kommununum, átti Føroya Pedagogfelag at tikið í egnan barm, ásanna síni mistøk, og roynt at fingið eitt gott samstarv við kommunurnar, sum bæði hava førleikan og viljan at umsita og menna dagstovnaøkið.

# Ríkisfelagsskapur ella fullveldi ?

**Samband ella loysing?**

**Atli Hansen**
*Gøtu 05.11.01*



Um vikuskiftið hevði Sambandsflokkurin ein heystfund í Havn. Tann stóra luttøkan og tann stóri hugurin til at luttaka í orðaskiftinum bendir á, at tað eru stór álvarsmál, vit skulu taka støðu til á báðum teim komandi valunum - fólkatingsvalið um stutta tíð og løgtingsvalið í seinasta lagi til várs.

Fundurin tók undir við til hesi bæðið valini serliga at leggja dent á ríkisfelagsskapin, tað persónliga frælsi og vælferðina og sjálvt um nógv onnur mál vóru havd á lofti, so var breið semja um, at hesi í løtuni skuldu hava ovasta raðfesti hjá Sambandsflokkinum.

Ríkisfelagsskapurin er upp á spæl. Eingin ivi um tað. Hesi bæði komandi valini verður úrslitið ein avgerð um ríkisfelgasskap ella fullveldi. Samband ella loysing.

Tað er eingin tilvild, at flokkurin hevur valt júst hesi trý málini at fara til val upp á. Tey eru við stórari umhugsan vald burtur úr rúgvuni, tí tey hoyra saman ella eru ein fortreyt fyri hvørjum øðrum.

Soleiðis er ríkisfelagsskapurin ikki nakað mál í sjálvum sær, men uttan hann vóru okkara persónligu frælsir - okkara rættur til at velja - ikki tey somu og uttan hann var vælferðin ikki á verandi støði. Eisini á nógvum øðrum økjum er ríkisfelagsskapurin ein fortreyt fyri verandi støði sum t.d. útbúgving, verja, rættarskipan, gjaldoyra, rætt til mangt og hvat o.m.a.

Ríkisfelagsskapurin er tað umhvørvi, sum okkara samfelag gjøgnum tey seinastu meira enn 600 árini hevur ment seg í til at vera á sama støði sum okkara grannalond á øllum økjum Ein avtøka av ríkisfelagsskapinum vil tí vera ein avtøka av møguleikum fyri framhaldandi menning. Men ein avtøka vil eisini vera eitt høgg av nógvum bondum landanna millum, høgg, sum fara at hava ólekjandi sár við sær.

Tí er tað ómetaliga umráðandi at gera sær greitt, at komandi fólkatingsval er eitt val um samband ella loysing og Sambandsflokkurin mælir øllum veljarum til við eini atkvøðu fyri einum sambandsvalevni at vísa á ríkisfelagsskapin sum okkara møguleika fyri varveita vunnin persónlig frælsir og vunna vælferð.






















































